

# Atli Dam hevði kraftar og kærleiks og hóvsemis anda

## -sum hann brúkti í tænastu fyri Føroyar segði Bjarni Bæk, dómprovstur m.a. til jarðarferðina hjá Atla Dam, fyrrverandi løgmanni í Vesturkirkjuni leygardagin. Vit prenta prædikuna.



Í einum av brøvum sínum skrivar Paulus: *Tí at ikki gav Guð okkum mótloysis anda, men kraftar og kærleiks og hóvsemis anda.*

Gud køvir ikki lívsmót okkara, men eggjar okkum til at liva og brúka møguleikar og tilfeingi okkara. Og hann gevur útgerð til at megna tað, sum vit skulu. Hann gav kærleiks anda. Tað merkir vilja til at satsa okkara tilfeingi fyri onnur, umsita tað, so at tey rundan um fáa gleði og lívsmót av tí. Ein tílíkur holdningur hóskar væl saman við hóvsemis anda, at vit leggja band á okkum og loyva hinum at vera tey, tey eru, so at tey fáa brúkt tilfeingi og møguleikar.

Og nú, vit steðga á, tí deyðin tykist hava tikið róður í hond og vil fáa tykkum at sigla í ring sum í mjørka, tørvar tykkum at verða vard móti mótloysis anda og at hoyra tað sum ein boðskap, at tit frá Gudi fingu kraftar og kærleiks og hóvsemis anda, so at tit kunnu varðveita tykkara identitet og fáa lívssigling tykkara til aftur at hava mál og meining.

Meðan tit í sorgartíðini orientera tykkum í tí broytta veruleikanum og samla kreftir til at reisast, eru tit ikki gloymd av hinum livandi Gudi. Í ein sálmi í GT hevur sálmaskaldið hesa erfaring við Gudi: *Um ævir hann minnist sáttmála sín, gjøgnum túsund ættir tað orðið hann gav.* Tað eru myndir, vit kenna og seta høgt, at tann, ið gav okkum sítt orð, stendur við tað. Tað minnast tit eisini Atla fyri. Tá Gud við Jesusi - í dópinum - gav tað lyftið at verða við okkum allar dagar alt til veraldar enda, so er tað lyftið ein hella at standa á, tá tit í morgin og framyvir mobilisera lívstilfeingi tykkara fyri at orientera tykkum í tí nýggja veruleikanum uttan Atla.

Eg skal nevna eitt orð aftrat í GT. Tað er eisini eitt lyfti, sum sálmaskaldið hevur góðar erfaringar av: *Frá øllum illum skal Harrin teg varða, hann tína sál skal varða. Tín útgang og inngang skal Harrin varða nú og um allar ævir.* Vit hoyra kanska lyfti um at sleppa undan øllum illum. Men tað eru nú ikki okkara erfaringar. Eg vil siga: tvørtur ímóti. Bæði tit og fleiri aðrar familjur í býnum í dag - sita við sorg, tí deyðin kom ógvisliga inn á tykkum. Gudstrúgvin man tó hava lært okkum, at tann vegin gongur lyftið jú ikki. Men har er ein týdningarmikil viðmerking løgd við: *hann tína sál skal varða.* Og tað er júst tað, okkum tørvar: at verða stuðlað til at varðveita okkara sál, okkara identitet. Tá fáa vit - tá vit eru klár aftur - tikið lívið uppá okkum, so vit fáa megnað tað, vit skulu. Tí tey, sum eru rundan um okkum, tørvar okkum og okkara førleikar, okkara kraftar og kærleiks og hóvsemis anda. Tann vegin fáa tey nýtt lívsmót.

Og eg hugsi, at tit til tað